

*Eitt álvarsligt ferðsluóhapp hendi við Breiðá, skamt við Fuglafjørð, seinnapartin fríggjadagin*

# Fekk skaða í ferðsluni

**Tríggir dreingir undir 20 ára aldur vóru í bilinum, sum seinnapartin fríggjadagin rendi í bergið nærindis Breiðá við Fuglafjørð. Hin eini drongurin er álvarsliga skaddur**

Vilmund Jacobsen

Tað var klokkan 17.14 fríggjadagin, at løgreglan fekk fráboðan um, at ein bilur hevði rent inn í bergið við ovaru síðu á vegum nærindis Breiðá, skamt úr Fuglafiðri.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn segði fríggjakvøldið, at tann, sum fráboðaði ferðsluóhappið, var rættiliga skelkaður av sjónini og hevði ikki so góðan hug at hyggja, hvussu til stóð í bilinum.

- Tað vísti seg eisini, at hetta var eitt rættiliga álvarsligt ferðsluóhapp. Vit sendu fýra sjúkrabilar á staðið, og tað vísti seg, at tríggir ungir menn - allir undir 20 ár - vóru í bilinum.

Vakthavandi segði, at teir allir vórðu fluttir á Landssjúkrahúsið.

- Hin eini hevði bert smávegis snuddir, annar hevði onkra skeinu, men hin triði hevði eftir øllum at døma fingið álvarsligan skaða í høvdið.

Vakthavandi helt fríggjakvøldið, at trupult var at siga, hvussu støðan hjá tí álvarsliga skadda var, men tá tey høvdu verið í samband við Landssjúkrahúsið, tóktist ungi maðurin stabilur.

Tá Sosialurin fríggjakvøldið spurdi, um hesin var uttanfyri lívsvanda, segði vakthavandi, at tað kundu tey einki siga um.



# Myndugleikarnir skulu ansa sær

**- Tað er so lætt at ganga á bonaðum gólvum í Havn og leggja avgjøld á onnur, sum royna at fáa tingini at hanga saman, sigur Mortan Johannesen, útróðrarmaður**

Vilmund Jacobsen

Hann hevur verið fiskimaður, síðan hann var stórur smádrongur og heldur lítið um, at myndugleikarnir nú av álvara ætla sær at leggja tilfeingisgjald á hjá teimum, sum fiska.

- Fyrsta treytin fyri, at fólkið skal fáa nakað burtur úr "fólksins ogn" er, at onkur ger íløgur í skip og bátar og ikki minst, at onkur tímur at fara til fiskiskap ella útróður.

Mortani Johannesen kemur til hugs bygdirnar, har fiskakjallari var, og menn í góðu tíðini av árinum róðu út í opnum báti.

- Tað var hugnaligt at síggja menn kasta fiskin upp um bryggjukantin, og síðan koyra hann niðan á vektina í trillubøru.

Útróðrarmaðurin spyr, hvat hesir menn mundu sagt, um politiski myndugleikin legði tilfeingisgjald á tann fisk, sum teir førdu til lands - fiskin, sum gav bygdarfólkinum nakrar arbeiðstímar í fiskakjallaranum, har hesin fiskur varð flaktur og saltaður.

### Drepur áhugan

- Nú skulu myndugleikarnir virkuliga ansa eftir, at tey ikki taka seinasta neistan og áhugan frá fiski-og útróðrarmonnum. So, stuttligt er hetta heldur ikki. Tey, sum halda, at tey fáa ov lítið burtur úr "fólksins ogn", kunnu sjálvi keypa sær skip ella bát.

Mortan Johannesen vísir á, at seinastu tíðina hava bæði skip og bátar verið til sølu, og tað er eingin sum forðar monnum og kvinnum at gera íløgur, um áhugi er.

- Tað er so lætt at ganga á bonaðum gólvum á ymiskum skrivstovum í Havn og grenja og leggja avgjøld á onnur, sum royna at fáa tingini at hanga saman, sigur Mortan Johannesen, sum stúrir fyri, at myndugleikarnir nú eru við til at køva seinasta neistan hjá fiski-og útróðrarmonnum.

> **»... onkur má gera íløgur í skip og bátar og onkur má tíma at fiska...**
> MORTAN JOHANNESEN

*vilmund@sosialurin.fo*

# Lágir fiskaprísir seinastu dagarnar

**Bæði hósdagin og fríggjadagin vóru prísirnir á toski og hýsu á Fiskamarknaði Føroya væl lægri, enn teir annars hava verið í longri tíð**

Vilmund Jacobsen

Fríggjadagin seldi Fiskamarknaður Føroya 76,5 tons av fiski fyri tilsamans 839.000 krónur.

Umleið 33 tons vóru av toski, mest av toski 3, sum fór fyri miðalprísin 14,51 krónur fyri kilo. Næst mest var av toski 4, sum fekk miðalprísin 10,70.

Næst størstu nøgdirnar vóru hýsa, umleið 26 tons tilsamans. Mest var av hýsu 2, sum fekk miðalprísin 9,03 krónur fyri kilo, sum má sigast at vera vánaligur hýsuprísur.

Hýsa 3 fór fyri einans 7,98 krónur í miðal fyri kilo.

Eini 9 tons vóru av longu, og her var besti miðalprísurin 11,46.

### Minni av upsa

Herfyri vórðu hampiliga stórar nøgdir av upsa seldar á Fiskamarknaði Føroya, men hvørki hósdagin ella fríggjadagin var talan um nakrar nevniverdar nøgdir.

At upsi í størri nøgdum verður seldur á marknaðinum, hevur ikki verið so vanligt.

Orsøkin til, at fiskurin hevur verið partur av útboðnum í eina tíð, er helst, at fiskurin hevur verið seldur óvirkaður av landinum, og tá er neyðugt, at fiskurin fyrst er farin um góðkenda uppboðssøluskipan.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var fríggjadagin 10,97 krónur fyri kilo, sum man vera ein hin lægsti miðalprísurin í longri tíð.

*vilmund@sosialurin.fo*


*Toskur 3 fór fríggjadagin fyri miðalprísin 14,51 – og toskur 4 fekk miðalprísin 10,70 krónur fyri kilo*